

*Bilrøðin mundi vera um ein hálvan kilometur ella so við bensinsøluna í Miðvági mikudagin*

*Mynd : Edvard Joensen*

# Bensin í Miðvági

**Seinnapartin mikudagin gekk sum rótasúpan um bygdirnar í Vágum, at bensin og diesel var at fáa í Miðvági. Eisini aðrastaðni kring landið fréttist hetta sum grindaboð**

BRENNIEVNI AT FÁA
*Edvard Joensen*

**Miðvági:** Tað var bensin og dieselolja at fáa í Miðvági seinnapartin mikudagin. Fylt var í tangarnar hjá Mylluni, og beinanveg stóðu bilar í hundraðtali í bíðirøð.

At tørvurin á brennievni til bilarnar er svárur, sást týðuliga í Miðvági seinnapartin mikudagin. Tað mesta av einum hálvum kilometri var bíðirøðin saktans, sum stóð frá bensinstøðini Mylluni uttan fyri kirkjuna og norður móti smiðjuni hjá J.K. Joensen.

Har vóru akfør av øllum sløgum. Alt frá vanligum persónbilum, hýruvognum og vøruvognum, eins og lastbilar og onkur bussur hjá Bygdaleiðum eisini stóð og bíðaði eftir hesum dropum, sum longst hevur verið so sáran eftir.

Á pumpuni stóð, at latið varð ikki í dunkar og tunnur. So har fingu øll burturav. Tað tók tað mesta av einum tíma at koma gjøgnum røðina og sleppa fram at pumpunum.

Men hvussu og hvaðani brennievnið var komið, fekst støðeigarin ikki at siga nakað um.

Honvegin veit Georg Hansen, næstformaður í Føroya Arbeiðarafelag, at siga, at oljufelagið Shell hevur smuglað olju og bensin út av goymsluni á Viðanesi í Havn, samstundis sum olja varð latin umborð á Smyril, sum lá við bryggju í Havn.

Arbeiðarafeløgini hava avtalað við Strandferðsluna, at Smyril skal fáa undantaksloyvi at sigla, meðan verkfall er. Tískil fær hann eisini loyvi at bunkra, og hevur avala verið við Shell um hetta.

Bunkringin plagar vanliga at vera á Drelnesi, sigur Georg Hansen. Men mikudagin varð bunkrað í Havn. Oljan varð koyrd við tangabilum av Viðanesi yvir á eystara havnarlagið, har Smyril lá.

Saman við tangabilunum hjá Shell vórðu so báðir teir privatu bilarnir í Vestmanna og í Sandavági boðsendir, og varð bensin og dieslolja fylt á teir, og latin Shell støðunum í Vestmanna og Miðvági.

– Tað er keðiligt, at Shell skal gera soleiðis, sigur Georg Hansen. Vit fara nú at gera av, hvørjar fylgjur tað fer at fáa fyri Shell, og so verða helst tiltøk sett í verk hareftir, sigur hann.

# Lítið at frætta

**Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum hevur ikki stórvegis hug til at gera viðmerkingar til støðuna á Fiskiveiðieftirlitinum og SEV, sum Maskinmeistarafelagið er partur av**

ÓSEMJUR
*Edvard Joensen*

Maskinmenninir á vaktar- og bjargingarskipunum høvdu fund við Fiskiveiðieftirlitið mikudagin. Hvat hendi á fundinum, hevur maskinmeistaraformaðurin lítlan hug at siga nakað um.

Tað einasta Jógvan Nybo, formaður í maskinmeistarafelagnum vil siga, er, at partanir á fundinum ikki samdust um nakað, sum kann loysa málið.

Í tíðindaskrivi, sum Maskinmeistarafelagið sendi út eftir fundin mikudagin, ger felagið greitt, at vandi er fyri, at vaktar- og bjargingarskipini, Brimil og Tjaldrið, ikki verða mannað eftir 1. juni, tá starvstíðin hjá maskinmonnunum gongur út.



*Bæði Brimil og Tjaldrið kunnu verða løgd, eins og Sundsverkið eisini alt um somu leið verður sløkt, og alt landið myrkalagt*

Maskinmeistarafelagið hevur fyrr í samsvari við tænastumannalógina kravt av Fiskiveiðieftirlitinum at fáa at vita nøvnini á teimum, sum hava søkt leysu maskinstørvini umborð á vaktar- og bjargingarskipunum. Fiskiveiðieftirlitið játtaði at lata felagnum hesi nøvnini á middegi hósdagin, sigur Jógvan Nybo.

Eitt annað mál, sum Maskinmeistarafelgið eisini er uppií, er málið um lønarsáttmálan hjá maskinmeistarunum hjá SEV.

Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, sigur seg ikki vilja góðkenna sáttmálan, sum undirskrivaður er.

SEV hevur síðan boðað frá, at elfelagið fer at gjalda løn eftir gamla sáttmálanum, tí landsstýrismaðurin ikki vil vita av tí nýggja.

– Tað vera teir um, sigur formaðurin í Maskinmeistaraleagnum. Vit kenna bara til ein sáttmála, og honum vænta vit, at SEV fer at gjalda løn eftir í næstu viku.

Jógvan Nybo vil ikki upplýsa, hvat Maskinmeistarafelgið fer at gera, um SEV velur at fara aftur til gamla sáttmálan, sum Maskinmeistarafelagið ikki góðkennir, tí ein nýgjur er gjørdur partanna millum.

Spurdur um Maskinmeistarafelagið fer at sløkkja motorarnar hjá SEV, svarar Jógvan Nybo, formaður í Maskinmeistarafelagnum, at sjálvandi er tann møguleikin til staðar.

– Men vit fara allarfyrst at boða SEV frá, hvat vit gera, áðrenn nakar annar fær tað at vita, sigur hann.



Verkfall:

# Umhugsa nú eisini at leggja skipini hjá Strandferðsluni

**Arbeiðarafeløgini siga, at Shell misbrúkar undantaksloyvið til at koyra olju. Ein avleiðing av hesum kann verða ,at øll undantaksloyvi til oljukoyring verða tikin aftur og so liggja bæði Smyril og hini skipini hjá Strandferðsluni**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

Nú er eisini vandi fyri, at bæði Smyril og hini skipini hjá Strandferðsluni verða løgd.

Endar semingsfundurin í gjár úrslitaleysur, er tað í hvussu so er ein spurningur, sum arbeiðarafeløgini í verkfalli fara at umrøða.

Men fakfeløgini leggja dent á, at endar tað við, at skipini verða løgd, er tað Oljufelagið Shell, sum hevur skyldina.

– Vit hava givið Skipunum hjá Stranadferðsluni undantaksloyvi at fáa olju. Tað er Shell, sum koyrir olju til skipini. Men tað vísir seg tíverri, at Shell misbrúkar hetta undantaksloyvi upp á tað grovasta, siga Bæði Ingeborg Vinther í Føroya Arbeiðarafelag og Hans Joensen í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Tey bæði siga, at tá ið Shell skuldi koyra olju umborð á Smyril mikudagin, gjørdi oljufelagið ikki mætari enn at smuggla tangabilar við bensini út av oljugoymsluni samstundis.

Hetta førdi við sær, at bensin var at fáa á støðunum í Norðstreymoy mikudagin.

Tey siga, at akkurát tað sama er hent hjá Shell í Suðuroy.

## Misbrúka vælvildina

Ingeborg Vinther og Hans Joensen harmast um, at Shell hevur gjørt av misbrúka vælvildina hjá fakfeløgunum, sum tey málbera seg.

Men tey siga eisini, at hetta er eitt mál, sum tey noyðast at taka upp.

Og spyrst onki burturúr semingsfundinum í gjár, kann avleiðingin verða, at harðari tiltøk verða sett í verk.

– Ein avleiðing av hesum kann verða, at vit heilt fara at forða fyri at bilar sleppa av goymslunum hjá Shell yvirhøvur, siga teir báðir fakfelagsformenninir.

Og tað fer sjálvsagt at føra til, at skipini hjá Strandferðsluni verða løgd, so hvørt, sum oljan gongur undan.

Hetta harmast tey bæði stórliga um, tí tey siga, at Strandferðslan hevur hildið avtaluna við fakfeløgini út í æsir.

– Men endar tað við, at Strandferðslan verður løgd av oljutroti, er tað Shell, sum hevur skyldina. Hevði Shell hildið avtaluna við arbeiðarafeløgini, var ongin vandi á ferð. Men teir kundu ikki halda sær at misbrúka okkara vælvild og tað mugu vit taka upp, siga tey bæði.

– Hetta er forkastiligt og eg vóni at allir limir í fakfeløgunum, sum eru viðskiftafólk hjá Shell, fara at minnast Shell hetta aftur, tá ið verkfallið er liðugt, sigur IngeborgVinther.

## Gera onki ólógligt

Hákun Djurhuus, stjóri á Shell, er ikki samdur við arbeiðarafeløgini.

–Tey starvsfólk hjá okkum, sum eru í arbeiðarafeløgunum, eru í verkfalli og tey gera gera onki, sum arbeiðarfeløgini ikki hava góðtikið.

Men tað eru nakrir bilførarar á tangabilum, sum eru sjálvstøðugt vinnurekandi og teimum ber ikki til at nokta at koyra.

– Hetta hevur onki við verkfallið at gera og tað er ólógligt at steðga teimum.

–Tað eru ikki vit, sum hava fingið undantaksloyvi. Tað er Smyril, sum hevur fingið undantaksloyvi og vit røkta tey viðskiftafólk, vit hava. Og at nokta sjálvstøðugt vinnurekandi at útinna tað arbeiðið, tey eru von at gera, kunnu vit ikki, tí tað er ólógligt og lógloysi kunnu vit ikki hava, sigur Stjórin í Shell.

Hann væntar ikki, at hetta fer at føra til, at viðskiftafólk fara at boykotta Shell eftir verkfallið.

– Vit bera okkum rætt at ímóti teimum, sum eru í verkfalli. Boykotta verkafeløgini okum, boykotta tey eisini sínar egnu limir.

– Tað er ongin at boykotta Shell, tí tað er ongin munur á teimum báðum oljufeløgunum, tí eisini Statoil hevur koyrt, har talan er um sjálvstøðugt vinnurekandi.

Og tað váttar Niels Juul Nattestad, stjóri á Statoil. Hann sigur, at tey kunnu ikki nokta teimum bilførarum, sum eru sjálvstøðugt vinnurekandi, at koyra olju, sum teir eru vanir.



*Verkfalsvaktir uttanfyri hjá Shell í gjáramorgunin. Arbeiðarafeløgini siga, at Shell misbrúkar vælvildina hjá feløgunum í verkfalli og tað kann føra til at ongin olja yvirhøvur sleppur av goymsluni og so liggur Smyril*

# Verkfallið kann enda í ruðulleika

**Arbeiðarafeløgini vilja ikki hava skyldina, tí endar verkfallið í ruðuleika, er tað tí, at vit verða provokerað út um alt mark, sigur Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Verkfallið kann enda í ruðulleika.

Tað heldur Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Hann sigur at tað sum er farið fram seinastu dagarnar, kann elva til, at støðan verður spentari og spentari og so veit ongin, hvat avleiðingin kann kann vera. Tað, hann sipar til, er tað sama, sum hann fleiri ferðir hevur sagt fyrr.

Og tað er, at fólk virða ikki verkfallið.

– Tað eru óteljandi dømi um, at fólk bjóða seg fram at gera verkfalsrakt arbeiði og at arbeiðspláss, har limir í arbeiðarafeløgunum arbeiðið, ganga at kalla sum vant, hóast verkfall er.

Hans Joensen segði áðrenn semingsfundin í gjáramorgunin, at endaði hann úrslitaleysur og fólk blíva við at bróta verkfallið, kann avleiðingin vera at støðan spennist sum frálíðir og so veit ongin, hvat kann henda.





*Tað fréttist skjótt, at bensin var at fáa í Vestmanna mikudagin og bilaraðið var langt. Hetta hevur loypt øði arbeiðarafeløgini og kann føra til, at verkfallið verður hert. Verður tað traðkað nóg hart á okkum, mugu vit siga stopp og so kann tað enda í ruðuleika, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag*

## Fásiga sær alla ábyrgd

Ein møgulig avleiðing av hesum er, at verkfallið herðist.

Áhaldandi royndirnar at bróta verkfallið kunnu føra til, at verkfalsvaktirnar á ávísum arbeiðsplássum verða styrktar.

Og tað kann eisini føra til, at vegir verða blokeraðir.

Men hann leggur dent á, at hendir tað, fara arbeiðarafeløgini at frásiga sær alla ábyrgd.

– Vit hava roynt at verið lagalig og gjørt sum minst burturúr blokadum. Men tað vísir seg ferð eftir ferð, at okkara vælvilji verður misbrúktur til at gera verkfalsrakt arbeiði. Tað einasta vit fáa burturúr okkara vælvild er tískil, at vit bíta okkum sjálvi í halan.

– Tí mugu vit umhugsa, hvat vit fara at gera.

Hann sigur, at eitt dømi um at vælvildin hjá arbeiðarafeløgunum verður misbrúkt, er at mikudagin skuldi Shell í Havn koyra olju umborð á Smyril, men brúkti ssamstundis høvi til at smugglað bensin og olju til onkrar bensinstøðir. Hetta hevur sett ferðasambandið í vanda, tí nú umhugsa arbeiðarafeløgini feløgini í verkfalli at taka undantaksloyvi til Strandferðsluna aftur. Sí grein aðrastaðni í blaðnum.

## Fara nú at herða verkfallið

Eisini Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, heldur, at støðan, sum verkfallið nú er komið í, ger tað neyðugt at herða tað.

– Tað er nógv verri at fáa undantaksloyvi nú, enn tað hevur verið og framyvir verða undantaksloyvi ikki givin.

Ein avleiðing av hesum er, at nú er undantaksloyvi tikið aftur, sum varð givið til neyðsynjararbeiðið í alibrúkum í samabandi við sjúku, so at arbeiðið í alibrúkunum kann steðgast frá løtu til løtu. Annars var avtalan, at uppsagnarfreistin var 48 tímar.

Annars verður alla tíðina umhugsað, í hvønn mun tað verður neyðugt at herða verkfallið og, hvørji stig so skulu setast í verk.

Endaði semingsfundurin í gjár úrslitaleysir fara fakfeløgini tískil at taka spurningin upp.